# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Tórolvur Skaalum
### In Memoriam

* 5. apríl 1960 † 15. september 2007



*Nú saknurin stórur er*
*tú farin er úr hesi verð*
*Altíð rætti tína hond*
*sum knýtti hjartans bond*

*Nær ella fjarð*
*tú altíð hjá okkum var*
*Altíð glaður í sinni*
*tað hava vit í minni*

*Ja, saknurin stórur er*
*tú manglar ímillum okkum her*

*Tú vegin vísti tann kæra*
*vit øll skulla fara*
*Um vit á Harran trúgva*
*vit hjá honum skullu búgva*

*Tú læt teg ikki fella í fátt*
*tá tú trein inn um Harrans gátt*
*Tú vísti okkum styrki*
*tað ljós í hjørtum byrti*

*Vit teg aldrin vilja gloyma*
*men í hjørtum okkara goyma*

*Tá sjúkan yvir tók valdi*
*tú teg ei tá fjaldi*
*Samlaði tín kæru í heimi*
*tó hesuferð ei í gleimi*

*Ynskti á tíni síðstu stund*
*okkum fjálga áðrenn blund*
*Tað segði okkum tá*
*at tú nú av foldum fór frá*

*Í tí Himalska stað*
*vit aftur møtast ein dag*

*Við skútuni so vøkur og fín*
*tú fórt handan sýn*
*Hetta bleiv tín síðsta ferð*
*úr okkara jarðusku verð*

*Vit tær tøkk fyri alt vilja siga*
*og við hesum minni tínum friða*

**Svigarinna Barbara S.**




## Dagurin í morgin

**16. oktober. Gallus,** deyður ár 640. Írskur munkur, sum læt kleystrið St. Gallen við Bodenvatnið byggja. Doyði 95 ára gamal.

VIÐMERKINGAR

# Meðan vit bíða eftir fíggjarnevndini

**ein áheitan frá Miðflokkinum á fíggjarnevndina um at raðfesta ríkidømið rætt.**

JENIS AV RANA



Fíggjarlógaruppskotið fyri komandi ár varð lagt fyri Løgtingið uttan ta tálman, sum sambandsleiðslan ætlaði- uttan iva alt gott um tað. Ístaðin vann uppskot fólka- og javnaðarfloksins, eitt uppskot uttan tær stóru visiónirnar.

Formaðurfíggjarnevndarinnar hevur gjørt greitt, at tá uppskotið kemur úr aftur nevndini, verður tað ikki at kenna aftur. Fyri Miðflokkin hevði hetta kenst ræðandi, um støða okkara ikki var hon, at vit í dag eiga eitt umboð í fíggjarnevndini. Eitt umboð, sum kann fylgja við, og vónandi ávirka fíggjarnevndarlimir at minnast týdningin av rættari raðfesting.

Inntøkuvøkstur uppá knappa milliard.

Hyggja vit at inntøkuvøkstrinum í árunum 2004 til 2007 hevur hesin verið 840 mill. , og taka vit 2008 við, so táttar vøksturin í eina milliard. Hugsa tær, at vanligi føringurin, gjøgnum skatt og avgjald av tí, hann hevur keypt, komandi ár fer at rinda útvið 1 mia. meira í landskassan, enn hann rindaði fyri 4 árum síðani. Fantastiskt. Men sæst hetta aftur í samfelagnum??? Uttan iva eru nøkur í tí hepnu støðu at kunna svara ja. Men munnu ikki flestu kenna nøkur, ið sita ivandi og hyggja rundan um seg, tá tey hoyra hesi tøl. Hava ilt við at kennast við hetta meirvirðið, sum jú verður tikið inn í landskassan, fyri at verða býtt útaftur, har tørvurin er størstur.

Hvar síggjast hesar eyka inntøkur aftur?

Síggjast tær aftur hjá barnafamiljunum, sum dagliga stríðast fyri at fáa dagliga dagin at hanga saman fíggjarliga?

Síggjast tær aftur hjá teim sjúku sum minkan í bíðitíðum til sjúkrahúsviðgerðir?

Síggja børnini tær aftur gjøgnum fyribyrgjandi kanningar hjá skúlalæknum ella hækkan av heilsusystratænastuni á tað støði, grannalond okkara bjóða sínum?

Sígjast tær aftur sum ein lætti í bústaðartrupulleikum teirra, ið av fysiskum ella sálarligum ávum eru tarnaði?

Merkjast tær hjá teim sálarliga sjúku, sum enn noyðast at búgva á sjúkrahúsdeildum?

Merkjast tær sum skattalættar hjá teimum lágløntu?

Og vit kundu hildi á at spurt!

Hugsið m.a. um hesi, góðu fíggjarnevndarlimir!

Tað er eingin kunstur at taka ímóti skatta- og avgjaldsmilliónum, tá byrður er góður. So er um allan tann partin av heiminum, vit samskifta við, í løtuni. Kynstrið, tað, ið vísir dugin í okkum politikkarum, er at síggja hann, hana og tey, sum av ymiskum ávum treingjaog rætta teimum hond. At senda teimum, sum ikki eru á ovastu rókum, men sum stríðast fyri ikki at detta útav niðastu rók, tann partin av fíggjarvøkstrinum, sum kann fáa hesi at fóta sær aftur.

Vit í Miðflokkinum vóna og síggja fram til at fáa eitt fíggjarlógaruppskot aftur úr fíggjarnevndini, har ríkdømið, sum Skaparin so ríkiliga unnir okkum, kenst raðfest frá hjartanum.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá elskaði maður, pápi, verpápi, abbi, og langabbi okkara

**Amon Djurhuus**

andaðist og varð jarðaður
Takk til heimahjálp og tykkum á Umlættingarheiminum í Gøtu, og til Eysturoyar Røktar- og Ellisheim fyri umsorgan og góða røkt tíðina hann var har.
Takk til Meinhard Bjartalíð, kirkjutænarar, sangarar, og til Maritu og Hjalta fyri vakra framførslu í kirkjuni
Tøkk fyri vitjanir, uppringingar, blómur, kransar, peningagávur, bakstur og Eldrafelagið Nón, og til tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Takk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Amy**
**Hanna, Hansina, Petur Juul, Poula, Gunnva og Sámal Erik**